# Hundalív í Sørvági

**Leysir hundar hava fleiri ferðir gjørt skaða á húsdjór í Sørvági. Bæði seyður og flogfenaður er dripin av hundum. Nú má hetta hundalívið steðgast, sigur ein teirra, sum mist hevur**

HUNDALÍV
*Edvard Joensen*



*Rodmund á Kelduni við dunnusteggjanum, sum fyrr í vikuni varð dripin av hundbiti. Ryggurin er skræddur upp, eins og bit eisini eru at síggja á høvdinum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:** Leysir hundar eru til stóran ampa fyri húsdjór í Sørvági. Bæði flogfenaður og seyður er dripin av leysum hundum, og spurningurin er bara, nær børnini fara at standa fyri tørni, sigur Rodmund á Kelduni, sum hevur mist bæði seyð og fugl.

Í fjør drap ein hundur eitt smálamb inni í seyðahúsinum hjá Rodmundi. Húsið var læst, men onkusvegna var hundurin so sloppin inn.

Ta ferðina fekk Rodmund endurgjald frá hundaeigaranum fyri lambið. Men aftur í heyst, eftir at seyðurin var komin innaftur, var sami hundur aftur í húsinum. Hesaferð saman við einum smábarni, sum hevði latið upp. Hesa seinnu ferðina kom Rodmund sjálvur so mikið tíðliga uppí, at hann fekk hundin útaftur, áðrenn hann gjørdi skaða.

– Men hundurin var á veg inn í sjálvt seyðarúmið, tá eg fekk hendur á hann, greiðir Rodmund frá. Eg misti hann aftur, men meldaði til løgregluna. Tað gekk so rúm tíð, áðrenn nakað svar kom haðani. Tá tað so kom, fekk eg bara at vita, at tað var ov lítið at reisa nakað sakarmál uppá.

## Fleiri dripin

Tað liggur ein deyður dunnusteggi í túninum. Ryggurin er skræddur upp, og tøkutenn av hundi síggjast tíðuliga millum herðabløðini. Eisini á høvdinum eru merki av biti.

– Soleiðis gongur tað fyri seg, sigur Rodmund á Kelduni og tekur deyða steggjan upp. Hesin kann bara koyrast í ruskílatið.

Nú er tíð uppá, at tað verður gjørt nakað við hetta annað enn bara tosað, sum tað vanliga plagar at vera. Tí tosað er nógv um leysar hundar. Ikki bara í Sørvági, men um tað heila land. Men tað vísir seg at vera ógvuliga ringt at koma til nakað ítøkiligt, sigur hann.

Hann sigur, at hann er ikki tann einasti, sum mist hevur kríatúr á hendan hátt. Fyri stuttum varð ein gásasteggi dripin á eini trøð í Sørvági. Eisini av hundi.

Men tað, sum kanska upp aftur verri er, greiðir hann frá, er at menn siga seg finna ryggbrotnan seyð í haganum. Eisini teir hava hug at halda, at hundar hava verið uppií.

– Tá teir fara eftir vaksnum seyði, kann vera so øgiliga skjótt, at eitt smábarn stendur fyri tørni. Og so er rættiliga galið.

## Politisk viðgerð

Rodmund á Kelduni sigur, at hann hevur fleiri ferðir tosað við bæði bygdarráðið og sýslumannin um málið, men har er einki ítøkiligt hent.

Eivind Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, váttar, at málið er komið til Sørvágs Kommunu, og at tað eisini hevur verið til viðgerðar og er avgreitt víðari til sýslumannin. Haðani er tað so ikki afturkomið, sigur hann.

Sørvágs Kommuna hevur samtykt at seta hundafangara, eins og kommunan eisini hevur høli klár at hava hundar í, sum upptiknir verða, sigur borgarstjórin. Eitt uppskot til kunngerð er gjørt.

Men alt skal góðkennast av løgregluni. Tí er málið sent sýslumanninum, men haðani er tað ikki afturkomið, sigur hann.

Á bygdarráðsfundi 12. december í fjør samtykti bygdarráðið, at orða kunngerð um leysgangandi hundar í Sørvágs Kommunu.

Uppskotið er sent sýslumanninum í Vágum til ummælis tann annan januar í ár, men er ikki afturkomið haðani, siga bæði borgarstjórin og avgreiðlan á kommunuskrivstovuni í Sørvági.

Regin Jespersen, sýslumaður í Vágum, sum hevur fingið uppskotið til ummælis, er staddur uttanlands, og tað eydnaðist ikki at hitta hann, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Setti sýslumaðurin í Vágum sigur, at hann kennir ikki til málið, og kann tí ikki gera nakra viðmerking til tað.



*Lambið, sum dripið varð av hundi í fjør. Huppurin er skræddur*
*Mynd: Rodmund á Kelduni*



*Steggin kann ikki brúkast til annað enn brenni hjá IRF*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Málið er óseriøst viðgjørd

**Tað er óseriøst at royna at kroysta eitt mál til fyrstu viðgerð, eftir at øll onnur mál hava fingið aðru viðgerð, og formaðurin hevur boðað frá, at tingið fer heim, sigur Kasten Hansen, landsstýrismaður um málið um blaðútberingina, sum bleiv borið út aftur úr Løgtinginum**

ÚTBERING
*Edvard Joensen*



*Karsten Hansen, landsstýrismaður, sigur, at málið var sera óseriøst viðgjørt*

Heldur enn at játtað pengar til at bera bløðini út fyri, var alt málið, sum tað var, borið út aftur úr Løgtinginum. Tí syrgdi landsstýrismaðurin við fígjarmálum fyri.

Karsten Hansen, landsstýrismaður, sigur, at málið var sera óseriøst viðgjørt. Roynt varð fyrst at fáa tað við á eykajáttanarlógina, men tí vísti Fíggjarnevndin frá sær.

– Síðan kom løgmaður og bað meg royna at savna nokk av undirskriftum millum tingmenn til at leggja málið fyri tingið við fráviki frá tíðarætlanini. Men tað vildi eg ikki, og so gjørdi løgmaður tað sjálvur, sigur landsstýrismaðurin.

Men løgtingsformaðurin vísti málinum aftur, tí hann hevur boðað frá, a t tingiðf er til hús, og tíð verður ikki til fleiri viðgerðir.

KarstenHansen sigur, at hann helt ikki grundarlag vera fyri at leggja málið fram yvirhjøvur, tí politisk semja var ikki í samgonguni fyri tí.

– Tað hevur verið viðgjørt á landstýrisfundi, har eg sjálvur ikki var til staðar, vísir hann á.

Tjóðveldisflokkurin vildi ikki taka undir við málinum í tí líki, tað varð lagt fram. Flokkurin vildi hava, at allur peningur, sum játtaður varð, skuldi fara til Postverkið sum so og ikki markast til at lata Postverkinum at bera nøkur ávís bløð út fyri.

Eisini varð víst á, at talan bara var um partar av landinum, og at eitt nú Suðuroyggin ikki var við í hesi útberingini.

Karsten Hansen noktar fyri, at hann er lagur undir politiskt trýst fyri at taka málið aftur.

Men hann hevur einki boð upp á, hvat Tjóðveldisflokkurin vil hava sett í staðin fyri tað uppskotið, sum lagt varð fram.

Heldur ikki hevur hann nakra viðmerking til, at hetta uppskotið í grundini bøtir um støðuna á útoyggjunum, sum eftir hesum uppskotinum høvdu fingið bløðini borin út leygardag. Tað hevði nevniliga verðið álagt Postverkinum at syrgt fyri tí, um uppskotið varð samtykt. Í dag verða leygardagsbløðini ikki borin út fyrr enn mánadag, har eingin serstøk útberingarskipan er.

– Men alt hatta kann gera tað sama og er at rokna sum spæl fyri gallarínum, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður. Tí av Løgtingsskrivstovuni varð sagt, áðrenn uppskotið kom í tingið, at fyri at kunna brúka hesar pengarnar, ætlanin var at játta, skal ein serstøk heimildalóg vera, og hon verður ikki liðug fyrr enn til ólavsøkutingsetuna kortini.

## Karsten tók útberingarstuðul aftur – løgmaður vónsvikin

ÚTBERINGARSTUÐUL
*Jan Müller*

Tað kom dátt við hjá løgmanni, tá hann í útvarpinum mikukvøldið frætti, at Karsten Hansen, landsstýrismaður hevði tikið málið um útberingarstuðul til bløðini aftur. Málið varð lagt fram og skuldi til 1. viðgerð á tingi, tá landsstýrismaðurin tók tað aftur við m.a. teirri grundgeving, at málið er ikki nóg fullfíggjað við tað at Suðuroyggin ikki var við í skipanini og tí at tingformaðurin hevði ikki viljað vikið frá tíðarfreistunum í tingskipanini. – Eg eri ómetaliga keddur av hesum, tí hetta var eitt stig á leiðini at kunna betra um blaðútberingina kring landið. Nú eru vit so aftur í somu støðu, har tað bara eru brúkararnir í Havnini, sum fáa ta bestu tænastuna. Og hetta er tí eitt stórt afturstig fyri aðrar partar av landinum.

Løgmaður sigur seg ikki skilja, hví Karsten Hansen tók málið aftur, nú tað bar til at fáa 23 tingmenn til at fáa málið lagt fram. – Eg haldi, at man hevði kunnað havt eina viðgerð av málinum í tinginum og har sagt sínar hugsanir heldur enn at taka málið aftur. Løgmaður er ikki samdur, tá tað verður sagt, at útjaðarin ikki fær ágóða av hesum tiltaki. Hann vísir á, at hetta var so ein roynd at seta hol á málið – at taka eitt fyrsta stigið – og vísir við hesum til, at í øllum okkara grannalondum verður almennur stuðul latin til útbering av dagbløðum. Anfinn Kallsberg vísir til, at í uppskotinum verður m.a. álagt postverkinum at fáa útjaðaranum bløðini borin útaftur leygardagar, har samferðsluviðurskiftini loyva tí. Leygardagsútberingin varð avtikin fyri nøkrum árum síðani. So talan er greitt um ábøtur til frama fyri búpláss uttanfyri Havnina og í útjaðaranum sigur løgmaður í viðmerkingini.

# Harmast – haldaranna vegna

**Eingin stuðul verður latin blaðhaldarum á hesum sinni, so sum løgmaður annars hevði skotið upp. Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, tók málið aftur mikudagin, og harvið fellir málið, sum ikki kann takast uppaftur fyrr enn eftir løgtingsvalið**

BLAÐÚTBERING
*Eirikur Lindenskov*

– Eg eri skuffaður – haldaranna vegna.

Hetta sigur Hjalgrim Samuelsen, eftir at Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fyrradagin tók uppskotið um stuðul til blaðútbering aftur. Løgmaður hevði fingið 21 tingmenn at skriva undir upp á at leggja málið fram, hóast tíðarfreistin var farin.

Hjalgrim Samuelsen er stjóri á Dimmalætting og nevndarformaður í Prentmiðstøðini, sum er prentsmiðjan hjá Dimmalætting og Sosialinum. Prentmiðstøðin tekur sær av útberingini av bløðunum í høvuðsstaðarøkinum hvørt kvøld og um alt landið fríggjakvøld.

Hjalgrim Samuelsen sigur, at hetta málið nú verður lagt á ís.

– Vit kunnu so bert biðja eftir, at vit fáa eitt nýtt landsstýrið, sum – eins og stjórnir í øðrum londum – er vinarligari sinnað mótvegis bløðnum.

Hjalgrim Samuelsen sigur, at arbeitt hevur verið við hesum málinum nú í fleiri ár, og at nú varð roknað við eini loysn, tá løgmaður sjálvur sum fimti landsstýrismaðurin, tók málið upp.

Stuðulin til blaðútbering kemur ikki á nakran hátt roknskapinum hjá bløðunum til góðar, sigur Hjalgrim Samuelsen. Talan er um stuðul til fólk, sum halda bløðini. Endamálið er, at fólk í størri bygdunum kring landið, bygdir, sum hava umleið 500 íbúgvar og fleiri, skulu kunnu fáa bløðini borin út um kvøldið, eins og í Havn, og til sama prís. Samstundis varð álagt Postverkinum at fáa fólki á útoyggj bløðini aftur borin út leygardag, har hetta kann lata seg gera, t. v. s. har flutningur er til bygdina leygardag.

Útberingin hjá Prentmiðstøðini er ikki bíligari enn tann hjá Postverkinum. Hon er eitt sindur dýrari, men við henni ber til at fáa bløðini út um kvøldið. Hjalgrim Samuelsen sigur, at leiðslurnar á bløðunum rokna við, at við hesi skipan ber til at fáa fleiri haldarar, sum aftur kann gera, at stykkjaprísurin fyri útberingina verður bíligari, við tað at fleiri fara at halda bløðini.




*Hjalgrim Samuelsen sigur, at arbeitt hevur verið við hesum málinum nú í fleiri ár, og at nú varð roknað við eini loysn, tá løgmaður sjálvur sum fimti landsstýrismaðurin, tók málið upp*

Enn var eingin reglugerð gjørd um, hvussu stuðulin skal gjaldast út, ella um, hvørji bløð fáa ágóðan av hesum. Postverkið definerar tíðindablað sum blað, ið kemur út fleiri enn seks ferðir um árið í fleiri enn 200 eintøkum. Um stuðulin verður útgoldin eftir hesum leisti, so hevði hann komið nógvum bløðúm til góðar.